## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin strúkur í vindi av landsynningi og regn, seinnapartin hvassur vindur av vestri og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av útsynningi, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og ælingur, partvís kavi, men leygardagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum frostmarkið og 4 stig.

# Oljan inn um skúlagátt

**Millum gestirnar á oljuráðstevnuni í seinastu viku var eisini ein skúlaflokkur av Kambsdali. Flokkurin, sum hevur evnafrøði, var komin at hyggja nærri at oljuvinnuni**

OLJURÁÐSTEVNA
*Heri á Rógvi*

Eitt evni, sum stundum hevur verið uppi at vent seinastu árini, eru næmingaferðir. Hesar ferðir, har næmingar vanliga ferðast til fjarskotin lond fyri at nema sær kunnleika og fáa ein smakk av lívinum.

Ein flokkur á Studentaskúlanum á Kambsdali gjørdi av at leggja leiðina til Havnar á eina heldur styttri ferð, enn tær vanliga eru. Leiðin gekk til Havnar, har ørindini vóru at luttaka á oljuráðstevnu.

Talan er um ein flokk, sum hevur evnafrøði sum valgrein á miðstigi, t.e. eitt ára skúlagongd eftir eitt ár kravt á fyrsta ári.

Ein partur av lesiætlanini er eitt valfrítt evni. Hetta evni er sambært oftani eitt, ið lærarin heldur vera spennandi, men onkuntíð koma broytingar fyri. Tá ið næmingarnir á evnafrøði flokkinum á miðstigi á Kambsdali skuldu velja valfrítt evni, valdu tey olju. Tað ber valla til at finna eitt evni, sum meira í tráð við tíðarandan, og tað var so hetta, sum tey settu sær fyri.

Oljuvinna er sjálvandi eitt rættiliga víttfevnandi hugtak, og tá ið tey skuldu seta seg meira inn í evni, so var tað sjálvandi við teirra treyt, at hetta skuldi hava við evnafrøðina at gera. Tað er fyri so vítt heldur ikki serstakliga torført, tá ið øll oljusavnandi prosessin er rættiliga evnafrøðilig, fyri at siga tað sum tað er. Tey royndu í fyrstu atløgu at sleppa at vitja umborð á Sovereign Explorer, men hetta eydnaðist ikki teimum. Tey kendu tað vera neyðugt at fara ein túr út um Eysturoynna fyri veruliga at kunna seta seg inn í neyðugu viðurskiftini. Tey frættu um oljuráðstevnuna í Havn, og hetta var sæð sum ein kærkomin møguleiki at nema sær meir kunnleika um evni. Við góðari hjálp frá Vinnuhúsinum og Amerada Hess.

Tá ið Sosialurin hitti flokkin á oljuráðstevnuni, so søgdu tey seg hava fingið nakað burturúr, hóast okkurt gott kundi vera eitt sindur háfloykt. Tey søgdu seg serliga hava fyri tí umhvørvisliga partinum, sum tey mestir eisini fara at leggja dent á í teirra arbeiði víðari. Næmingarnir, sum eru úr bæði 3. og 2.S, vistu ikki, um hetta við oljuvinnuni var nakað, ið kundu gerast teirra framtíðar yrkisleið, men tey vóru glað fyri at hava fingið møguleikan at vitja oljuráðstevnua – eisini tí hetta var eitt brot frá vanliga skúladegnum.

Tá tey ímóti sumri skulu til prótvøku, so bíðar teimum eisini okkurt brotið um oljuvinnu, so tey hava hetta at gleða seg til. Tað verður tó mestir ikki nakar trupulleiki.



*Johnny Lamhauge, Magni Glyvradal, Ragnhild í Skorini, Aksel Mikkelsen, Bárður Svínoy, Olav Færø, Poula Dulavík Olsen, Johan Petur Dam, Jytta Midjord, Ásvør Lervig og Dánjal Petur Højgaard, lærari, umboðaðu evnafrøðini ættina á Kambsdali á oljuráðstevnuni. Jytta og Ásvør vanta á myndini.*
*Mynd: Heri á Rógvi*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷14 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | ÷11 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | 6 |
| Halifax | 7 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 4 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷8 |
| Bukarest | ÷1 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 9 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 11 |
| Miami | – |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 968 hPa. vestan fyri Skotland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týsnáttina.




Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/12 kl. 06[00]– 03/12 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,0°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 02/12 kl. 06[00]– 03/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 4,5 mm


**Uppsetan av antennum og parabolum**

Ring og hoyr nærri ella stokk inn á gólvið



**Søla og tænasta**
**Verkstaður**
**Antennu- og parabolmontering**
**Útleigan**
radioep@olivant.fo
RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16 · FO- 100 Tórshavn
Tlf. 318277 · Fax 318377

**BILLUTIR**



**ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR**
**F.A. BILLUTIR**
tlf. 421605 fax 421666


## VESTFALLSKYRRINDI

23. nov.: Mánin longst frá jørðini
30. nov.: Fullmáni
6. des.: Mánin næstur jørðini
7. des.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/Vágafirði | | Skúvoyar-/Skopunarfirði | | Hestfirði/Sundalagnum | | Vestmannasundi | | Mykinesfirði | | Nólsoyarfirði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/Haraldssundi | | Kalsoyar-/Svínoyarfirði | | Hvannasundi | | Fugloyarfirði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 4. des | 09.07 | 21.33 | 08.07 | 20.33 | 08.22 | 20.48 | 11.07 | 23.33 | — | 12.07 | 07.22 | 19.48 | 06.22 | 18.48 | 09.22 | 21.48 | 10.22 | 22.48 | 08.52 | 21.18 | 10.07 | 22.33 |
| 5. des | 09.59 | 22.25 | 08.59 | 21.25 | 09.14 | 21.40 | 11.59 | — | 00.33 | 12.59 | 08.14 | 20.40 | 07.14 | 19.40 | 10.14 | 22.40 | 11.14 | 23.40 | 09.44 | 22.10 | 10.59 | 23.25 |
| 6. des | 10.50 | 23.30 | 09.50 | 22.30 | 10.05 | 22.45 | 00.25 | 12.50 | 01.25 | 13.50 | 09.05 | 21.45 | 08.05 | 20.45 | 11.05 | 23.45 | — | 12.05 | 10.35 | 23.15 | 11.50 | — |
| 7. des | — | 12.10 | 11.10 | 23.48 | 11.25 | — | 01.30 | 14.10 | 02.30 | 15.10 | 10.25 | 23.03 | 09.25 | 22.03 | — | 12.25 | 00.45 | 13.25 | 11.55 | — | 00.30 | 13.10 |

5 707265 100029 >